

Føroyska Bíbliufelagið

Kirkjuárið 2018 - 19

# BÍBLIULESIÆTLANIN

*Soleiðis gert tú:*
*Skriftstað er til hvønn dag í árinum, t.d. Jóh. 5,1-18 (Jóhannes-evangeliið 5. kapittul, ørindi 1-18). Tak og les dagsins tekst í Bíbliuni. Aftast í Bíbliulesiætlanini er listi við styttingum.*

**Bíbliulesiætlanin**
Kirkjuárið 2018-19
Útgevari: Føroyska Bíbliufelagið

Lars Ole Gjesing hevur valt bíbliutekstirnar
Ritstjórn: Karen Karmark Kristensen
Tematekstir: Lars Ole Gjesing
Myndir: Maja Lisa Engelhardt úr Bíbliunnar størstu frásøgnum, Bibelselskabets Forlag 2014
Perma: Finnleif Mortensen
Grafikkur: Lotte Lyng
Týtt og rættlisið: Hjørleif Poulsen og Henrietta Arge Jacobsen
Uppseting og prent: Føroyaprent
www.biblia.fo

Svanamerktur prentlutur 541 705

# Les - sum av nýggjum!

Tá man lesur, er tað ofta við einum ávísum fordómi. Stundum kann tað føra til, at væntanirnar vinna á lesnaðinum. Tá hendir tað, at man lesur tað man heldur, ístaðin fyri at lesa tað, sum veruliga stendur.

Bíblian er ein bók, ið nógv hava eina meining um. Tí kunna vit stundum vera tikin á bóli, tá vit síggja hvat veruliga stendur. Tað hendir eins væl hjá nýggjum sum royndum lesarum. Til dømis stendur ikki, at tað var eitt súrepli, sum Adam og Eva ótu í Edens hava. Heldur ikki er tað, sum nógv halda, at tað var ein hvalur, sum át Jónas, tá hann rímdi undan Gudi; tað stendur ein fiskur.

Tá man fylgir Bíbillesiætlanini, er tað ein góður máti at tryggja sær, at man kemur runt í allari bíbliuni og ikki einans heldur seg til somu støðini. Man lesur nógv tað ein kennir, men kanska eisini okkurt, sum man ikki hevur lisið fyrr. Og hóast man lesur tað man kennir ella heldur seg kenna, so vísur tað seg, at við Heilaga Andans vegleiðing, so lata nýggjar síður seg upp.

At Jónas profetur var tríggjar dagar í maganum hjá fiskinum, er eitt líknilsi um, at Jesus var tríggjar dagar í deyðsríkinum. Ætt eftir ætt hava kent seg aftur í neyðarópi profetsins úr tí djúpa myrkrinum, og líka so nógv hava funnið troyst hjá tí náðiga Gudi, sum bjargaði honum úr myrkrinum. Gud lat eisini ein oljurunn vaksa upp og veita Jónasi skugga fyri tí heitu sólini. Hetta fegnaðist hann um, men ikki hevði hann samkenslu, tá sami Gud spardi fólkini í Nineve, tí tey vendu um frá síni synd.

Ja, soleiðis kunnu vit læra nógv um okkum og okkara menniskjaligu veikleikar, við at lesa hesar aldargomlu søgurnar. Men vit læra sanniliga eisini ein náðifullan Gud at kenna – ein sum hevur samkenslu við okkum, eisini tá vit sjálvi eru orsøk til neyðina.

Sjálvt í Jónasi, einum av minstu bókunum í Bíbliuni, er ein yvirflóð av tilfari at undrast um og at grunda yvir. Tí við Guds livandi Orði og Anda er tað óavmarkað, hvat vit kunna fáa búrtur við at lesa bókina yvir øllum øðrum bókum. Jónas profetur og hinir smáu profetarnir eru millum tekstirnar, sum komið verður ígjøgnum í hesi útgávu av Bíbliulesiætlanini.

Bíbliulesiætlanini fyri 2018-19 er fjórða útgáva av fimm, har vit koma ígjógnum, næstan alla Bíbliuna. Eitt lítið stykki hvønn dag, men sum orðatakið sigur "Mangir løkir smáir, gera stórar áir", - og í ánni er nógv lív og kraft.

Góðan lestrarhug og Guðs signing!

Gunnar K Nattestad, *aðalskrivari*
*Leysliga umsett eftir Birgitte Stoklund Larsen*
*aðalskrivara í Danska Bíbliufelagnum*

# DESEMBER

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 2. | 1.s.í advent // **Matt. 21,1-9** |
| Mánadagur 3. | **Luk. 1,1-25** // Mangir skulu fegnast um føðing hansara |
| Týsdagur 4. | **1,26-45** // Sí, eg eri tænastukvinna Harrans |
| Mikudagur 5. | **1,46-66** // Hátt setir sál mín Harran |
| Hósdagur 6. | **1,67-80** // Sólarris av høgum himni hevur vitjað okkum |
| Fríggjadagur 7. | **2,1-21** // Eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð |
| Leygardagur 8. | **Sl. 97,1-12** // Hann varðveitir sálir heilagu sína |
| Sunnudagur 9. | 2.s.í advent **// Luk. 21,25-36** |
| Mánadagur 10. | **Luk. 2,22-40** // Eygu míni hava sæð frelsu tína |
| Týsdagur 11. | **2,41-52** // Eg eigi at vera í tí, sum faðirs míns er |
| Mikudagur 12. | **3,1-22** // Tú ert sonur mín, hin elskaði |
| Hósdagur 13. | **3,23-38** // Og sjálvur var Jesus okkurt um tríati ára gamal, tá ið hann byrjaði |
| Fríggjadagur 14. | **4,1-15** // Menniskjan livir ikki av breyði eina |
| Leygardagur 15. | **Sl. 98,1-9** // Fegnist fjøllini øll fyri ásjón Harrans |
| Sunnudagur 16. | 3.s.í advent // **Matt. 11,2-10** |
| Mánadagur 17. | **Luk. 4,16-30** // Andi Harrans er yvir mær |
| Týsdagur 18. | **4,31-44** // Teir rópaðu og søgdu: Tú ert sonur Guðs |
| Mikudagur 19. | **5,1-16** // Setið gørn tykkara út eina setu |
| Hósdagur 20. | **5,17-32** // Syndir tínar eru tær fyrigivnar |
| Fríggjadagur 21. | **5,33-6,5** // Menniskjusonurin er eisini hvíludagsins harri |
| Leygardagur 22. | **Sl. 99,1-9** // Ein fyrigevandi Guð ert tú |
| Sunnudagur 23. | 4.s.í advent // **Jóh. 1,19-28** |
| Mánadagur 24. | Jólaaftan // **Luk. 2,1-14** ella **Matt. 1,18-25** |
| Týsdagur 25. | Jóladagur // **Luk. 2,1-14** |
| Mikudagur 26. | 2. jóladagur // **Matt 23,34-39** |
| Hósdagur 27. | **Luk. 6,6-19** // Og tey, ið plágað vóru av óreinum andum, vórðu grødd |
| Fríggjadagur 28. | **6,20-36** // Vælsignið tey, ið biðja ilt yvir tykkum |
| Leygardagur 29. | **Orðt. 20,1-15** // Tað er manni ein sómi at halda sær frá klandri |
| Sunnudagur 30. | Sunnudagur millum jóla og nýggjárs // **Luk. 2,25-40** |
| Mánadagur 31. | **Luk. 6,37-49** // Tí at hvørt eitt træ kennist av síni egnu frukt |

# JANUAR

| | |
|---|---|
| Týsdagur 1. | Nýggjársdagur // **Luk. 2,21** |
| Mikudagur 2. | **Jón. 1,1-16** // Takið meg og tveitið meg fyri borð |
| Hósdagur 3. | **2,1-10** // Tá førdi tú lív mítt upp úr grøvini |
| Fríggjadagur 4. | **4,1-11** // Eg visti, at tú ert ein náðigur Guð, miskunnsamur |
| Leygardagur 5. | **Sl. 100,1-5** // Farið inn í hans portur við lovi |
| Sunnudagur 6. | Trettandi // **Matt. 2,1-12** |
| Mánadagur 7. | **Nah. 1,1-14** // Nú bróti eg av tær ok hans og kvetti tíni bond |
| Týsdagur 8. | **2,1-11** // Harrin reisir aftur tign Jákups |
| Mikudagur 9. | **2,12-3,7** // Oydd er Nineve! Men hvør vil eymka hana? |
| Hósdagur 10. | **3,8-11** // Stórmenn hennara vórðu lagdir í fjøtur |
| Fríggjadagur 11. | **3,12-19** // Hirðar tínir dúra, Assurs kongur |
| Leygardagur 12. | **Sl. 101,1-8** // Eitt svikafult hjarta skal víkja mær frá |
| Sunnudagur 13. | 1. s. e.trettanda // **Luk. 2,41-52** ella **Mark. 10,13-16** |
| Mánadagur 14. | **2. Mós. 32,1-18** // Kom tú og ger okkum gud |
| Týsdagur 15. | **32,19-35** // Eg skal royna at fáa sáttargerð fyri syndir tykkara |
| Mikudagur 16. | **33,1-23** // Lat meg tó síggja dýrd tína |
| Hósdagur 17. | **34,1-16** // "Hin vandláti" verður Harrin nevndur |
| Fríggjadagur 18. | **34,17-35** // Hann skrivaði á talvurnar sáttmálaorðini, tey tíggju orðini |
| Leygardagur 19. | **Sl. 102,1-12** // Mínir dagar fara sum roykur |
| Sunnudagur 20. | 2. s. e. trettanda // **Jóh. 2,1-11** |
| Mánadagur 21. | **Luk. 7,1-17** // Guð hevur vitjað fólk sítt |
| Týsdagur 22. | **7,18-35** // Sí, eg sendi sendiboð mítt undan tær |
| Mikudagur 23. | **7,36-50** // Trúgv tín hevur frelst teg; far tú í friði |
| Hósdagur 24. | **8,1-18** // Tann, ið oyru hevur at hoyra við, hann hoyri |
| Fríggjadagur 25. | **8,19-39** // Meistari, meistari, vit ganga burtur |
| Leygardagur 26. | **Orðt. 20,16-30** // Sig ikki: «Eg skal løna við illum |
| Sunnudagur 27. | 3. s. e. trettanda // **Matt. 8,1-13** |
| Mánadagur 28. | **Luk. 8,40-9,6** // Óttast ikki; trúgv eina |
| Týsdagur 29. | **9,7-27** // Men tit, hvønn siga tit meg vera? |
| Mikudagur 30. | **9,28-45** // Menniskjusonurin fer at verða givin upp í mannahendur |
| Hósdagur 31. | **9,46-62** // Tann, sum minstur er av tykkum øllum, hann er |

# Tólv smáir profetar

Av teimum 39 bókunum í Gamla Testamenti eru tær 16 profetabøkur, soleiðis at skilja, at tær bera navnið á einum profeti og hava frásagnir um profetsins boðan og virki. Í vavi eru tær rættiliga ymiskar, og fevna frá Óbadiasar Bók við eini einstakari síðu til Jesajasar Bók við 64 síðum. Vanliga verða profetabøkurnar býttar upp í tær fýra stóru (t.e. fýra tær longstu), sum eru Jesajasar Bók, Jeremiasar Bók, Ezekiels Bók og Dánjals Bók, og so tær hinar12 smáu, sum standa sum tær síðstu 12 skriftirnar í Gamla Testamenti.

Ein profetur í Ísrael er ein persónur, sum boðar Guds vilja fyri høgum og lágum í fólkinum og fyri vinum og fíggindum. Alt eftir umstøðunum hótta teir við dómi og undirgangi ella lova frið og frelsu. Teirra boðan er varðveitt av einum næmingabólki, og viðhaldsfólk hava savnað og varðveitt hana munnliga og seinni samanskrivað frásøgnina. Í fleiri førum er



tað gjørt við heldur so lýsingum av tí søguliga samanhanginum, at tað í dag er trupult at tíðarfesta tær umstøður, profeturin talar inn í.

Ein røð av evnum ganga aftur í profetabókunum. Fyrst og fremst verður avgudadyrkanin álopin. Men profetarnir eru atfinningarsamir móti tempultænastuni og virkinum hjá prestunum. At halda offurfyriskipanirnar er ikki nøktandi gudstænasta. Harrans vilji er umsorgan fyri teimum veiku og teimum fremmandu – miskunnsemi fram um sláktoffur. Ofta verður dómur boðaður fólksins leiðarum, prestunum og teimum ríku fyri at vanrøkja teirra ábyrgd. Kríggj og aðrar vanlukkur verða gjølla lýstar og tulkaðar sum ein væl uppiborin revsing yvir teir. Ein dag fer Gud endaliga at oyða allan óndskap, og friður og rættvísi fara at fylla heimin (í profetabókunum kemur tað til sjóndar í forsøgnini um “Harrans dag”).

Í trongdartíðum eru profetarnir ofta fyltir við troyst og lyftum um bjarging. Dóms- og frelsuboðanin verður hjá fleiri av profetunum (t.d. Sefanja og Zakarias)  bundin saman við tankanum um, at dómur og revsing  raka meginpartin av Ísraels fólki, meðan frelsa og bjarging fellur einum minni parti av fólkinum í lut. Leivdin av Ísraels fólki fær loyvi at koma heimaftur úr útlegdini og liva í tí komandi friðarríkinum, har øll heimsins fólkasløg fara at savnast um Ísraels Gud.

Í Nýggja Testamenti hava hesar profetabøkur stóran leiklut. Jesus førdi fleiri av hesum evnum víðari í síni boðan, ikki minst boðanina um Guds miskunnsemi móti menniskjunum og kravið um menniskjans miskunnsemi móti hvørjum øðrum: Eisini Jesu boðan um Guds útvaldu er allastaðni at síggja í Nýggja Testamenti væl stuðlað av profetanna boðan.

Mynd: Maja Lisa Engelhardt.
Fra BIbelens største fortællinger.
Bibelselskabets Forlag 2014, síða 166.

# FEBRUAR

| | |
|---|---|
| Fríggjadagur 1. | **Luk. 10,1-20** // Guðs ríki er komið í nánd hjá tykkum |
| Leygardagur 2. | **Sl. 102,13-23** // Harrin byggir upp Zion |
| Sunnudagur 3. | 4. s. e. trettanda // **Matt. 8,23-27** |
| Mánadagur 4. | **Luk. 10,21-37** // Alt er mær givið í hendur av faðir mínum |
| Týsdagur 5. | **10,38-11,13** // Biðið, og tykkum skal verða givið |
| Mikudagur 6. | **11,14-32** // Sí, meir er her enn Jónas |
| Hósdagur 7. | **11,33-54** // Eyga títt er ljós likamsins |
| Fríggjadagur 8. | **12,1-12** // Tit eru meira verdir enn mangir spurvar |
| Leygardagur 9. | **Sl. 102,24-29** // Teir forganga, men tú verður |
| Sunnudagur 10. | 5. s. e. trettanda // **Matt. 13,24-30 ; Kol. 3,12-17** |
| Mánadagur 11. | **Luk 12,13-31** // Stúrið ikki fyri lívinum |
| Týsdagur 12. | **12,32-48** // Har sum skattur tykkara er, har vil eisini hjarta tykkara vera |
| Mikudagur 13. | **12,49-59** // Hvussu ber tað til, at tit ikki duga at skyna á hesi tíðini |
| Hósdagur 14. | **13,1-17** // Kvinna, tú ert loyst frá veikleika tínum |
| Fríggjadagur 15. | **13,18-35** // Víkið frá mær øll tit, sum gera órætt |
| Leygardagur 16. | **Sl. 103,1-10** // Hann fyrigevur øll misbrot tíni |
| Sunnudagur 17. | Septuagesima // **Matt. 20,1-16** |
| Mánadagur 18. | **Mika 1,1-7** // Harrin, drottin, kemur sum vitni móti tykkum |
| Týsdagur 19. | **1,8-16** // Raka av tær hár og skegg vegna tíni ástkæru børn |
| Mikudagur 20. | **2,1-11** // Vei teimum, ið upphugsa illverk |
| Hósdagur 21. | **2,12-3,8** // Eg skal savna allar Ísraels leivdir |
| Fríggjadagur 22. | **3,9-4,8** // Ikki skulu tey venja seg til bardaga longur |
| Leygardagur 23. | **Orðt. 21,1-15** // Harrin metir hjørtuni |
| Sunnudagur 24. | Seksagesima // **Luk. 8,4-15** |
| Mánadagur 25. | **Mika 4,9-14** // Mangar tjóðir hava nú savnað seg móti tær |
| Týsdagur 26. | **5,1-14** // Hann skal vera friður |
| Mikudagur 27. | **6,1-16** // Mál hevur Harrin at kæra við fólk sítt |
| Hósdagur 28. | **7,1-6** // Allir teir tráa eftir blóði |

# MARS

| | |
|---|---|
| Fríggjadagur 1. | **Mika 7,7-20** // Hvør gud er sum tú, ið tekur burtur misbrot og fyrigevur |
| Leygardagur 2. | **Sl. 103,11-22** // Mansins dagar eru sum grasið |
| Sunnudagur 3. | Sunnudagur í føstuinngangi // **Matt 3,13-17** |
| Mánadagur 4. | **Luk. 14,1-14** //Bjóða fátækum, kryplum, høltum og blindum |
| Týsdagur 5. | **14,15-35** // Komið, tí at nú er alt tilgjørt |
| Mikudagur 6. | **15,1-10** // Samgleðist við mær, tí at eg havi funnið seyð mín, sum burtur farin var |
| Hósdagur 7. | **15,11-32** // Hann var farin og er fingin aftur |
| Fríggjadagur 8. | **16,1-13** // Húsbóndin rósaði tí órættvísa húshaldaranum |
| Leygardagur 9. | **Sl. 104,1-18** // Tú fjøllini vatnar frá høgalofti tínum |
| Sunnudagur 10. | 1. s. í føstu // **Matt 4.1-11** |
| Mánadagur 11. | **Luk. 16,14-31** // Minst tú til, sonur, at tú hevur notið títt góða, meðan tú livdi. |
| Týsdagur 12. | **17,1-19** // Jesus, meistari, miskunna okkum |
| Mikudagur 13. | **17,20-37** // Guðs ríki er innan í tykkum |
| Hósdagur 14. | **18,1-17** // Latið børnini koma til mín |
| Fríggjadagur 15. | **18,18-34** // Kom so og fylg mær |
| Leygardagur 16. | **Sl. 104,19-35** // Tú teimum gevur, og tey henta upp |
| Sunnudagur 17. | 2. s. í føstu // **Matt 15,21-28** |
| Mánadagur 18. | **Luk. 18,35-19,10** // Í dag má eg koma at gista í tínum húsi |
| Týsdagur 19. | **19,11-27** // Einum og hvørjum, sum hevur, skal verða givið |
| Mikudagur 20. | **19,28-44** // Vælsignaður veri kongurin, ið kemur í Harrans navni |
| Hósdagur 21. | **19,45-20,8** // Hús mítt eigur at vera eitt bønhús |
| Fríggjadagur 22. | **20,9-26** // Eg vil senda elskaða son mín |
| Leygardagur 23. | **Sl. 105,1-15** // Um ævir hann minnist sáttmála sín |
| Sunnudagur 24. | 3. s. í føstu // **Luk 11,14-28** |
| Mánadagur 25. | **Luk. 20,27-40** // Hann er ikki Guð teirra deyðu |
| Týsdagur 26. | **20,41-21,11** // Her skal ikki liggja steinur eftir á steini |
| Mikudagur 27. | **21,12-28** // Tá skulu tey síggja menniskjusonin koma |
| Hósdagur 28. | **21,29-22,6** // Orð míni skulu als ikki forganga |
| Fríggjadagur 29. | **22,7-30** // Eg eri millum tykkara sum tann, ið tænir |
| Leygardagur 30. | **Orðt. 21,16-31** // Ei verður tann ríkur, ið elskar vín og olju |
| Sunnudagur 31. | Miðføstu Sunnudagur // **Jóh. 6,1-15** |

# Høvuðspresturin

Ovastur fyri prestastættini við templið í Jerusalem var høvuðspresturin. Undir honum hoyrdu prestar og levittar, sum gjørdu tænastu í skiftum, meðan høvuðspresturin hevði fastan bústað í Jerusalem og gjørdi dagliga tænastu í templinum. Allir hesir tænarar vóru av Levi ætt.

Fyrsti høvuðspresturin í bíbliusøguni er beiggi Móses, Aron. Karmurin er ferðin hjá Ísraels fólki gjøgnum oyðimørkina, har Gud ger sáttmála við fólkið og í Aðru og Fimtu Másebók kunnger Mósesi ásetingarnar í sáttmálanum. Millum tær mongu greinar í lógini er ein røð av væl lýstum ásetingum um búnan hjá høvuðsprestinum, hansara vígslu og tænastu. Tað skilst m.a., at høvuðspresturin bar vavhúgvu (turban) og eitt ennisband úr gulli, og at hann í bróstskjøldrinum bar Urim og



Tummin, sum nýttir vórðu í lutakasti at avgera ávís sakarmál. Tað, sum lutirnir vístu, varð hildið at kunngera Guds vilja í málinum.

Vigslan av høvuðsprestinum skilti seg frá vígsluni av prestum, við tað at hann varð rituelt salvaður, eins og kongar og útvaldir profetar vórðu tað í Gamla Testamenti.

Leikluturin hjá høvuðsprestinum sum ovasti millummaður millum Gud og fólkið er eyðsýndur á tí árliga veitsluhaldinum kallað "tann stóri sáttardagurin". Her gongur høvuðspresturin inn handan tjaldið í tað heilagasta rúmið í templinum og slettir blóð av offurdjórinum á Sáttmálaørkina. Bert høvuðspresturin hevði atgongd til tað allarheilagasta, og bert henda eina dagin í árinum (Triðja Mósebók kapittul 16).

Í teimum kongaleysu tíðunum eftir útlegdina í Bábylon, har tað jødiska landið meginpartin av tíðini var undir fremmandum harradømi, fær høvuðspresturin stóran týdning sum fólksins leiðari á odda fyri tí 70 mans stóra ráðnum, kallað "synedriið". Hetta endurspeglast í frásøgnunum í evangeliunum í handtøkuni av Jesusi og rættarmálinum móti honum, har høvuðspresturin hevði leiklutin sum bæði ákæri og dómari (Markusevangeliið kapittul 14,53-64).

Við tí nýggja sáttmálanum, sum verður settur í gildi við Jesu krossfesting, fellur alt burtur, sum eitur offurtænasta og fatanin av, at ein prestur er millummaður millum Gud og menniskju. Myndliga verður tað sagt, við at tjaldið fyri tað allarheilagasta skrædnar, tá Jesus doyr (Markusevangeliið kapittul 15,38). Nú kann ein og hvør menniskja sjálv koma fram fyri Gud. Hetta evnið verður nágreiniliga viðgjørt av tí ókenda rithøvundanum av Hebrearabrævinum. Kristus verður her lýstur sum tann endaligi høvuðspresturin, sum við at ofra seg sjálvan ger enda á allari tempultænastu. "Men hesin hevur borið fram eittans offur fyri syndir, og er so setstur með alla við høgru hond Guðs" (Hebrearabrævið kapittul 10,12).

Mynd: Maja Lisa Engelhardt.
Úr Bibelens største fortællinger.
Bibelselskabet Forlag 2014, síða 142.

# APRÍL

| | |
|---|---|
| Mánadagur 1. | **4. Mós. 10,1-10** // Ger tær tveir lúðrar úr silvuri |
| Týsdagur 2. | **10,11-36** // Teir hildu nú frá fjalli Harrans |
| Mikudagur 3. | **11,1-15** // Gev okkum kjøt at eta |
| Hósdagur 4. | **11,16-35** // Er armur Harrans styttur? |
| Fríggjadagur 5. | **12,1-16** // Man Harrin einans tala við Móses? |
| Leygardagur 6 | **Sl. 105,16-25** // So til Egyptalands Ísrael kom |
| Sunnudagur 7. | Boðanardagur Mariu // **Luk. 1,26-38** |
| Mánadagur 8. | **Luk. 22,31-46** //Og hann varð roknaður javnt við lógbrotsmenn |
| Týsdagur 9. | **22,47-62** // Hetta er tykkara tími og vald myrkursins |
| Mikudagur 10. | **22,63-23,7** // Ert tú kongur Jødanna? |
| Hósdagur 11. | **23,8-25** // Hvat ilt hevur hann tá gjørt? |
| Fríggjadagur 12. | **23,26-49** // Í dag skalt tú vera við mær í páradís |
| Leygardagur 13. | **Sl. 105,26-35** // Móses hann sendi, tænara sín |
| Sunnudagur 14. | Pálmasunnudagur // **Matt. 21,1-9** |
| Mánadagur 15. | **Luk. 23,50-24,12** // Hann er ikki her, men hann er risin upp |
| Týsdagur 16. | **24,13-35** // Verð hjá okkum |
| Mikudagur 17. | **24,36-53** // Tit eru vitni um hetta |
| Hósdagur 18. | Skírhósdagur // **Matt. 26,17-30** ella **Luk. 22,14-20** |
| Fríggjadagur 19. | Langi fríggjadagur // **Matt. 27,31-56.** ella **Mark. 15,20-39** |
| Leygardagur 20. | **Sl. 105,36-45** // Hann mintist sítt heilaga orð til Ábrahams |
| Sunnudagur 21. | Páskadagur // **Mark. 16,1-8** |
| Mánadagur 22. | 2. páskadagur // **Luk. 24,13-35** |
| Týsdagur 23. | **4. Mós. 13,1-33** // Tað flýtur í mjólk og hunangi |
| Mikudagur 24. | **14,1-25** // Eftir tínum orði vil eg fyrigeva |
| Hósdagur 25. | **14,26-45** // Í fjøruti ár bøta fyri misgerðir tykkara |
| Fríggjadagur 26. | **15,1-26** // Soleiðis skulu tit bera tykkum at |
| Leygardagur 27. | **Orðt. 22,1-16** // Harrans eygu varða um kunnskap |
| Sunnudagur 28. | 1. s. e. páskir // **Jóh. 20,19-31** |
| Mánadagur 29. | **4. Mós. 15,27-41** // Tílíkur maður skal týna lívið |
| Týsdagur 30. | **16,1-24** // Lít ikki at ofrum teirra |

# MAI

| | |
|---|---|
| Mikudagur 1. | **4. Mós. 16,25-50** // Jørðin læt upp gap sítt og gloypti teimum |
| Hósdagur 2. | **17,1-13** // Stavur Árons bar leyv |
| Fríggjadagur 3. | **18,1-19** // Tú skalt lata loysa frumburðir |
| Leygardagur 4. | **Sl. 106, 1-12** // Hann teir førdi gjøgnum dýpið |
| Sunnudagur 5. | 2. s. e. páskir // **Jóh. 10,11-16** |
| Mánadagur 6. | **4. Mós. 18,20-32** // Levi sonum gevi eg alla tíggjund í Ísrael |
| Týsdagur 7. | **19,1-13** // Hann skal reinsa seg frá synd |
| Mikudagur 8. | **19,14-20,1** // Alt, sum hin óreini nertur við, skal vera óreint |
| Hósdagur 9. | **20,2-21** // Tá streymaði vatnið út í nøgdum |
| Fríggjadagur 10. | **20,22-21,9** // Ger tær koparorm og set hann upp á stong |
| Leygardagur 11. | **Sl. 106,13-23** // Guð teir gloymdu, frelsara sín |
| Sunnudagur 12. | 3. s. e. páskir // **Jóh. 16,16-22** |
| Mánadagur 13. | **4. Mós. 21,10-31** // Ísrael settist niður í øllum borgum Ámorita |
| Týsdagur 14. | **21,32-22,12** // Kom tí og bølbið hesa tjóð fyri meg |
| Mikudagur 15. | **22,13-21** // Ger ikki annað enn tað, sum eg sigi tær |
| Hósdagur 16. | **22,22-35** // Hví hevur tú nú tríggjar ferðir lamt øsnu tína? |
| Fríggjadagur 17. | Dýri biðidagur // **Matt. 3,1-10** |
| Leygardagur 18. | **Sl. 106,24-39** // Landið, hitt dýrmæta, vrakaðu teir |
| Sunnudagur 19. | 4. s. e. páskir // **Jóh. 16,5-15** |
| Mánadagur 20. | **4. Mós. 22,36-23,10** // Harrin legði tá Bileami orð í munnin |
| Týsdagur 21. | **23,11-30** // Nú hevur tú vælsignað teir |
| Mikudagur 22. | **24,1-9** // Vælsignaður hvør, ið teg vælsignar |
| Hósdagur 23. | **24,10-25** // Stjørna rennur upp av Jákupi |
| Fríggjadagur 24. | **25,1-18** // Harrans vreiði tendraðist |
| Leygardagur 25. | Orðt. 22,17-29 // Ræn ikki hin vesæla |
| Sunnudagur 26. | 5. s. e. páskir // **Jóh. 16,23b-28** |
| Mánadagur 27. | **Óbad. 1,1-14** // Vanvirdur skalt tú vera |
| Týsdagur 28. | **1,15-21** // Nær er nú dagur Harrans |
| Mikudagur 29. | **Mal. 1,1-5** // Eg elskaði Jákup, men Esav hataði eg |
| Hósdagur 30. | Kristi himmalsferðardagur // **Mark. 16,14-20** |
| Fríggjadagur 31. | **Mal. 1,6-14** // Tit bera óreinan mat upp í altar mítt |

# Skriftirnar eftir Lukas

Eins og Gamla Testamenti hevur sína longu røð av søgufrásagnarligum skriftum, sum siga frá um Ísraels fólk, soleiðis hevur eisini Nýggja Testamenti eitt umfatandi søguritsavn. Lukasevangeliið er saman við Ápostlasøguni eitt samlað savn í tveimum bindum av sama rithøvundi. Tað byrjar við boðanini um føðing Jóhannes Doyparans og sigur í fyrra bindi frá um Jesu gerningar og læru og endar við himmalsferðini. Seinna bind tekur í, har Lukasevangeliið endar, og heldur fram við frásøgnini um, hvussu tann elsta kirkjan breiðir seg út frá Jerusalem yvir Samariu og út í allan heimin. Í fyrra parti í Ápostlasøguni (kapittul 1-12) er ápostulin Pætur mest frammi, men í seinna parti er tað Paulus og hansara missiónsferðir, sum er tann reyði tráðurin.

Lukasevangeliið og Ápostlasøgan hava ikki bert fingið íblástur frá frásagnarbókunum úr Gamla Testamenti (t.d. Kongabøkurnar, Samuelsbøkurnar v.fl.), men eisini frá tí lærdu søguskriving í rithøvundans grikska og latínska umhvørvi. Tað sæst millum annað á, at rithøvundurin leggur dent á raðfylgju og ordan í báðum sínum bindum (sí t.d. inngangsørindini til báðar bøkurnar), á tí nágreiniligu tíðarfesting av høvuðshendingunum í frásøgnini um Jesus, og at tíðarfestingin av hesum hendingum verður sett í samband við veraldarsøguna og ta jødisku søguna (sí t.d. Lukasevangeliið kapittul 2,1-2 og 3,1-2).

Rithøvundans søguhugsan kemur sjónligast til sjóndar í tí, hvussu hann sær ta samlaðu frásøgnina um Guds frelsu. Hon er býtt upp í fýra tíðarskeið: Fyrst Ísraels ella profetanna tíðarskeið, sum rakk fram til Jóhannes doyparan, og tað avgerandi í hesum tíðarskeiðnum er alt tað, sum profetiskt peikar fram ímóti Kristusi. Síðan kemur tíðarinnar ósvitaligi miðdepil: Jesu lívstíð fram til hansara himmalsferð. Triðja tíðarskeiðið er tíðarskeiðið hjá kirkjuni ella missiónini, sum byrjar við, at lærusveinarnir taka ímóti Heilaga Andanum á hvítusunnu, og sum ber í sær, at gleðiboðskapurin verður borin út til heimsins enda. Loksins fylgir Jesu afturkoma og at Guds Ríki endaliga verður sett á stovn.

Sum tað er í Matteus-, Markus- og Jóhannesevangeliunum, upplýsa hvørki Lukasevangeliið ella Ápostlasøgan nøvnini á rit-



Mynd: Maja Lisa Engelhardt.
Úr Bibelens største fortællinger.
Bibelselskabet Forlag 2014, síða 76.

høvundunum ella hvar ella nær tey eru skrivað. Í øllum hesum førum stava tey nøvn, sum vit í dag kenna frá skriftunum, á siðaarv frá fornkirkjuni. Tær báðar bøkurnar eru tískil vorðnar knýttar at tí Lukasi, sum tríggja staðni í Paulusar brøvum verður nevndur sum hansara starvsfelagi. Í tí eina verður Lukas umtalaður sum lækni (Kolossubrævið kapittul 4,14).

Tær báðar bøkurnar standa væl í tí kristnu frásøgnini. Ápostlasøgan er tann elsta og mest álítandi frásøgnin um ta fyrstu øldina í kirkjunnar søgu, og hóast Lukasevangeliið er á hædd við hini trý evangeliini, sermerkir tað seg í tí at vera einsamalt um týðandi tekstir sum jólaevangeliið og líknilsið um hin miskunnsama samáriubúgvan og hin burturfarna sonin.

# JUNI

| | |
|---|---|
| Leygardagur 1 | **Sl. 106,40-48** // Hann leit til teirra í teirra neyð |
| Sunnudagur 2. | 6. s. e. páskir // **Jóh. 15,26-16,4** |
| Mánadagur 3. | **Mal. 2,1-9** // Tessvegna havi eg latið tykkum vera vanvirdar |
| Týsdagur 4. | **2,10-16** // Slítið ikki trúskap við ungdómsvív tykkara |
| Mikudagur 5. | **2,17-3,5** // Sí, eg sendi ørindreka mín |
| Hósdagur 6. | **3,6-15** // Hvussu eiga vit at snúgva okkum aftur? |
| Fríggjadagur 7. | **3,16-4,6** // Sí, eg sendi tykkum Elia profet |
| Leygardagur 8. | **Sl. 107,1-16** // Leiddi teir út úr myrkri og skugga |
| Sunnudagur 9. | Hvítusunnudagur // **Jóh. 14,22-31** |
| Mánadagur 10. | 2. hvítusunnudagur // **Jóh. 3,16-21** |
| Týsdagur 11. | **Hebr. 1,1-14** // Sonur mín ert tú, í dag havi eg føtt teg |
| Mikudagur 12. | **2,1-18** // Við dýrd og æru tú hevur krýnt hann |
| Hósdagur 13. | **3,1-19** // Vit eru vorðnir luttiknir í Kristi |
| Fríggjadagur 14. | **4,1-16** // Guðs orð er livandi og máttmikið |
| Leygardagur 15. | **Sl. 107,17-32** // Hann frá grøvini bjargaði teimum |
| Sunnudagur 16. | Trinitatis sunnudagur // **Jóh. 3,1-15** |
| Mánadagur 17. | **Hebr. 5,1-14** // Tú ert prestur allar ævir á Melkisedeks vísi |
| Týsdagur 18. | **6,1-20** // Grípa vónina, sum vit hava eins og akker sálarinnar |
| Mikudagur 19. | **7,1-17** // Hann er gjørdur líkur syni Guðs |
| Hósdagur 20. | **7,18-28** // Hann altíð livir til at ganga í forbøn fyri teimum |
| Fríggjadagur 21. | **8,1-13** // Nú hevur hann fingið eina so mikið mætari halgitænastu |
| Leygardagur 22. | **Sl. 107,33-43** // Men fátækum hann lyftir úr armóð |
| Sunnudagur 23. | 1. s. e. trinitatis // **Luk. 16,19-31** |
| Mánadagur 24. | **2. Kong. 1,1-18** // Fell tá eldur av himni |
| Týsdagur 25. | **2,1-14** // Og Elia fór til himins í storminum |
| Mikudagur 26 | **2,15-3,3** // Andi Elia er komin yvir Elisa |
| Hósdagur 27. | **3,4-27** // Hjá honum er orð Harrans |
| Fríggjadagur 28. | **4,1-17** // Far nú og sel oljuna og rinda aftur skuld tína |
| Leygardagur 29. | **Orðt. 23,1-14** // Málsmaður teirra er sterkur |
| Sunnudagur 30. | 2. s. e. trinitatis // **Luk. 14,16-24** |

# JULI

| | |
|---|---|
| Mánadagur 1. | **2. Kong. 4,18-37** // Var tað eg, sum bað teg, harri, um son? |
| Týsdagur 2. | **4,38-44** // Tú Guðsmaður! Deyðin er í pottinum |
| Mikudagur 3. | **5,1-16** // Tváa tær, so verður tú reinur |
| Hósdagur 4. | **5,17-27** // Eg vil renna aftan á hann og fáa eitthvørt frá honum! |
| Fríggjadagur 5. | **6,1-23** // Soleiðis varaði hann Ísraels kong mangar ferðir |
| Leygardagur 6. | **Sl. 108,1-14** // Eg morgunroðan vil vekja |
| Sunnudagur 7. | 3. s. e. trinitatis // **Luk. 15,1-10** |
| Mánadagur 8. | **2. Kong 6,24-7,8** // Nú sært tú, hvussu mikla ógævu Harrin hevur sent |
| Týsdagur 9. | **7,9-20** // Teir hvørki sóu ella hoyrdu nakran mann |
| Mikudagur 10. | **8,1-15** // Leingi stóð Guðsmaðurin og stardi fram fyri seg |
| Hósdagur 11. | **8,16-29** // Hann gjørdi tað, sum ilt var í eygum Harrans |
| Fríggjadagur 12. | **9,1-13** // Eg salvi teg til kong yvir Ísrael |
| Leygardagur 13. | **Sl. 109,1-15** // Gott teir mær løna við illum |
| Sunnudagur 14. | 4. s. e. trinitatis // **Luk. 6,36-42** |
| Mánadagur 15. | **2. Kong. 9,14-37** // Tak og tveit hann út á bøin |
| Týsdagur 16. | **10,1-14** // Ikki ein teirra komst undan |
| Mikudagur 17. | **10,15-36** // Boðið hátíðarstevnu fyri Báali |
| Hósdagur 18. | **11,1-16** // Gav honum kongsnavn og salvaði hann |
| Fríggjadagur 19. | **11,17-12,1** // Átalju drópu teir við svørði |
| Leygardagur 20. | **Sl. 109,16-20** // Hann bølbiðjan elskar |
| Sunnudagur 21. | 5. s. e. trinitatis // **Luk. 5,1-11** |
| Mánadagur 22. | **2. Kong. 12,2-22** // Ámazja, sonur hansara, tók ríkið eftir hann |
| Týsdagur 23. | **13,1-9** // Ásjerustólpan í Sámáriu lótu teir standa |
| Mikudagur 24. | **13,10-25** // So doyði Elisa og varð jarðaður |
| Hósdagur 25. | **14,1-14** // Júda mátti lúta fyri Ísrael |
| Fríggjadagur 26. | **14,15-29** // Jeróboam legðist til hvíldar hjá fedrum sínum |
| Leygardagur 27. | **Orðt. 23,15-35** // Keyp tú sannleika, og sel hann ikki |
| Sunnudagur 28. | 6. s. e. trinitatis // **Matt. 5,20-26** |
| Mánadagur 29. | **Hebr. 9,1-14** // Hon er líking um hesa núverandi tíð |
| Týsdagur 30. | **9,15-28** // Nú er hann opinberaður eina ferð með alla |
| Mikudagur 31. | **10,1-18** //Við eittans ofri gjørt teir fullkomnar, sum verða halgaðir |

# Gávur, ið halda!




– til børn, ung og vaksin!







**Føroyska Bíbliufelagið**
www.bíblia.fo





245,-

**Bíblia**
Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður
Kápa: Edward Fuglø

**Gamla testamenti sum ljóðbók**
Gamla og Nýggja testamenti fáast sum ljóðbøkur bæði á fløgu og á bandi fyri sama prís.

**900,-**

**Nýggja testamenti sum ljóðbók**

**300,-**

STUÐLA NÝGGJU BÍBLIUUMSETINGINI Á S. 28

**Bíblia – Ættarbíblia**
við stórari skrift
Stødd 21,5 x 30,4 cm.
Við gullskurði.
1211 síður
Myndprýtt hevur hennara hátign
Margreta drotning II.

**600,-**



---




**345,-**

**Bíblia í svørtum**
leðurlíki við gullskurði
Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður

---

**Myndasøgan um**
**Menniskjusonin**
er grundað á tey fýra evangeliini í Nýggja Testamenti. Pætur apostul lænir okkum eygu at síggja tær hjartanemandi og skakandi hendingarnar kring um Jesu lív.
136 síður

**120,-**




Sí annars á www.biblia.fo

# Lógin

Allar Ísraels lóg- og revsuásetingar eru býttar yvir Aðru til Fimtu Mósebók. Har eru ásetingar fyri harðskapi, stuldri, endurgjaldi, sjúku, gudstænastu, kynsligari samveru, jarðarbýti, rættargangi og mmongum øðrum. Tær grundleggjandi meginreglurnar eru styttar í teimum tíggju boðunum, sum kunnu lesast bæði í Aðru Mósebók kapittul 20 og í Fimtu Mósebók kapittul 5.

Henda lógin í Gamla Testamenti verður tulkað sum teksturin til tann sáttmálan, sum Gud ger við sítt fólk undir ferðini í oyðimørkini: "Um tit nú vilja lýða rødd míni og halda sáttmála mín, so skulu tit vera ogn mín fram um allar tjóðir, tí at mín er øll jørðin". (Onnur Mósebók 19,5). Lógin fær høvuðssætið í Ísraels gudsdýrkan, sum m.a. kemur til sjóndar í Sálmi 24,3-6, har m.a. stendur: "Hvør torir ganga niðan á fjall Harrans,



hvør torir standa á hans heilaga staði? Hann, ið sakleysar hevur hendur og hjarta reint, ikki hevur vent sínum huga at lygnum og ikki svør svikara eið. Hann skal av Harranum fáa signing og rættlæti frá sínum frelsunnar Guði."

Evangeliini siga frá eini langari røð av tvídráttum um at lýða lógina millum Jesus og hansara lærusveinar øðrumegin og teir skriftlærdu og fariseararnar hinumegin. Í Markusarevangeliinum kapittul 2,1-3,6 verður sagt frá fleiri førum, har Jesus verður ákærdur fyri at bróta lógina við at geva syndanna fyrigeving, vera saman við tollarum og syndarum, lítilsvirða fastar reglur, at gera arbeiði – undir hesum at lekja – á hvíludegnum. Í øllum hesum førum verjir Jesus atburðin hjá lærusveinunum við, at hann er í samsvari við djúpastu meining í lógini, sum er at ansa eftir og varða um mannalív við umsorgan og miskunn. Soleiðis leggur Jesus dent á, at grundarlagið í allari lógini er kærleiki til Gud og næstan (Matteusevangeliið kapittul 22,34-40).

Í Fjallataluni (Matteusevangeliið kapittul 5-7) førir Jesus fram eina røð av týdningarmiklum ásetingum í lógini og gevur teimum skerpandi tulking, sum vísir, at lógin kann ikki haldast eftir síni ætlan bert við ytri gerningum, men bert við heilhugað at svara skaparans góðsku við tokka til mannalívið.

Í Paulusar brøvum fær tvídrátturin um lógina nakrar sjónligar og ógvusligar lýsingar: "Men at eingin verður rættvísgjørdur fyri Guði við lóg, tað er skilligt, tí at hin rættvísi skal liva við trúgv" (Galatarbrævið 3,11) og "Tí at øll lógin er uppfylt við einum orði, við hesum: «Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg.» (Galatarbrævið kapittul 5,14). Tað fær tó ikki Paulus heilt at vraka lógina. Hon kann geva góða vegleiðing um, hvat ið er synd. Men hon er ikki nakar vegur til rættvísi og frelsu.

Tann leiklutin, sum lógin hevði í gamla sáttmálanum, hevur í nýggja sáttmálanum lyftið um Guds náði ístaðin fyri, sum verður móttikið við trúgv.

Mynd: Maja Lisa Engelhardt
Fra Bibelens største fortællinger
Bibelselskabets Forlag 2014, síða 36

# AUGUST

| | |
|---|---|
| Hósdagur 1. | **Hebr. 10,19-39** // Hin rættvísi mín skal liva av trúgv |
| Fríggjadagur 2. | **11,1-16** // Trúgv er treyst í tí, sum vónað verður |
| Leygardagur 3. | **Sl. 109,21-31** // Lat teir bert banna, tá tú vilt vælsigna |
| Sunnudagur 4. | 7. s. e. trinitatis // **Mark. 8,1-9** |
| Mánadagur 5. | **Hebr. 11,17-31** // Við trúgv ofraði Ábraham Ísak |
| Týsdagur 6. | **11,32-12,3** // Jesus, upphavsmaður og fullkomnari trúarinnar |
| Mikudagur 7. | **12,4-17** // Tráið eftir friði við øll |
| Hósdagur 8. | **12,18-29** // Vit fáa eitt óskakandi ríki |
| Fríggjadagur 9. | **13,1-16** // Bróðurkærleikin vari við |
| Leygardagur 10. | **Sl. 110,1-7** // Tú prestur skalt verða um allar ævir á Melkisedeks vísi |
| Sunnudagur 11. | 8. s. e. trinitatis // **Matt 7,15-21** |
| Mánadagur 12. | **Hebr. 13,17-25** // Náðin veri við tykkum øllum! |
| Týsdagur 13. | **Sef. 1,1-13** // Dagur Harrans er komin nær |
| Mikudagur 14. | **1,14-2,3** // Hann skal beina fyri og gera bráðan enda á øllum |
| Hósdagur 15. | **2,4-11** // Hann skal oyða av jørðini allar gudar |
| Fríggjadagur 16. | **2,12-3,5** // Dómarar hennara sum úlvar á kvøldi |
| Leygardagur 17. | **Sl. 111,1-10** // Mikil eru Harrans verk, gjøgnumhugsað |
| Sunnudagur 18. | 9. s. e. trinitatis // **Luk. 16,1-9** |
| Mánadagur 19. | **Sef. 3,6-13** // Av eldi frá vandlæti mínum skal jørðin øll verða oydd |
| Týsdagur 20. | **3,14-20** // Á teirri stund, tá ið eg føri tykkum heim |
| Mikudagur 21. | **2. Kong. 15,1-16** // Tó vórðu offurheyggjarnir ikki avtiknir |
| Hósdagur 22. | **15,17-31** // Hann gjørdi tað, sum ilt var í eygum Harrans |
| Fríggjadagur 23. | **15,32-16,6** // Son sín læt hann ganga gjøgnum eldin |
| Leygardagur 24. | **Sl. 112,1-10** // Sælur er hann, ið Harran óttast |
| Sunnudagur 25. | 10. s. e. trinitatis // **Luk. 19,41-48** |
| Mánadagur 26. | **2. Kong. 16,7-20** // Alt hetta gjørdi hann vegna Assurs kongs |
| Týsdagur 27. | **17,1-18** // Assýriu kongur herleiddi Ísrael til Assurs |
| Mikudagur 28. | **17,19-41** // Óttist ikki aðrar gudar |
| Hósdagur 29. | **18,1-12** // Hizkia gjørdi tað, sum rætt var í eygum Harran |
| Fríggjadagur 30. | **18,13-25** // Tú troystar á vagnar og hestar Egyptalands! |
| Leygardagur 31. | **Orðt. 24,11-22** // Gleð teg ikki, tá ið fíggindi tín fellur |

# SEPTEMBER

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 1. | 11. s. e. trinitatis // **Luk. 18,9-14** |
| Mánadagur 2. | **2. Kong. 18,26-37** // Man tá Harrin kunna bjarga Jerúsalem? |
| Týsdagur 3. | **19,1-19** // Óttast ikki tey hádingsorð |
| Mikudagur 4. | **19,20-28** // Við ørindrekum tínum hevur tú háðað Harran! |
| Hósdagur 5. | **19,29-37** // Frá Jorsalborg skal ganga út leivd |
| Fríggjadagur 6. | **20,1-11** // Eg havi hoyrt bøn tína og sæð tár tíni |
| Leygardagur 7. | **Sl. 113,1-9** // Hin vesæla lyftir úr skarni |
| Sunnudagur 8. | 12. s. e. trinitatis // **Mark. 7,31-37** |
| Mánadagur 9. | **2. Kong. 20,12-21** // Alt, sum í húsi mínum er, hava teir sæð |
| Týsdagur 10. | **21,1-18** // Eg vil turka burtur Jerúsalem |
| Mikudagur 11. | **21,19-22,7** // Hann veik hvørki til høgru ella vinstru |
| Hósdagur 12. | **22,8-20** // Eg havi funnið lógbókina í húsi Harrans |
| Fríggjadagur 13. | **23,1-14** // Og alt fólkið gekk undir sáttmálan |
| Leygardagur 14. | **Sl. 114,1-8** // Fyri Harrans ásjón skelvi tú, jørð |
| Sunnudagur 15. | 3. s. e. trinitatis // **Luk.10,23-37** |
| Mánadagur 16. | **2. Kong. 23,15-24** // Haldið nú páskir fyri Harranum, Guði tykkara |
| Týsdagur 17. | **23,25-30** // Eg vil siga burtur Jerúsalem |
| Mikudagur 18. | **23,31-24,7** // Hann læt landið bøta |
| Hósdagur 19. | **24,8-17** // Hann herleiddi alla Jerúsalem |
| Fríggjadagur 20. | **24,18-25,17** // Hann setti eld á hús Harrans |
| Leygardagur 21. | **Sl. 115,1-11** // Guð vár tó er á himni |
| Sunnudagur 22. | 14. s. e. trinitatis // **Luk. 17,11-19** |
| Mánadagur 23. | **2. Kong. 25,18-30** // Teir fóru til Egyptalands, tí teir óttaðust Kaldear |
| Týsdagur 24. | **1. Jóh. 1,1-2,6** // Guð er ljós og myrkur als ikki er í honum |
| Mikudagur 25. | **2,7-17** // Tað er ikki eitt nýtt boð, sum eg skrivi til tykkara |
| Hósdagur 26. | **2,18-29** // Børn míni, verðið verandi í honum |
| Fríggjadagur 27. | **3,1-10** // Vit skulu verða kallað Guðs børn; og tað eru vit |
| Leygardagur 28. | **Orðt. 24,23-34** // At gera mannamun í dómi er ikki gott |
| Sunnudagur 29. | 15. s. e. trinitatis // **Matt. 6,24-34** |
| Mánadagur 30. | **1. Jóh. 3,11-24** // Vit skulu elska hvør annan |



Mynd: Maja Lisa Engelhardt
Fra Bibelens største fortællinger
Bibelselskabets Forlag 2014, síða 28

# Evangelium

Tann nýmótans lesarin setir “evangelium” í samband við frásagnir um Jesu lív og virki fram til hansara deyða og uppreisn. Evangelium í tí týdninginum eru fýra dømir um í Nýggja Testamenti, og tey eru bundin at Matteusar, Markusar, Lukasar og Jóhannesar nøvnum.

Í sjálvum sær kann orðið “evangelium” umsetast til “góður boðskapur”, og hesin týdningur er at finna í politiska málinum í Rómverjaríkinum. Her varð tað nýtt um at kunngera avgerðandi hendingar, sum vóru gleðiligar fyri ríkið og tess íbúgvar: ein keisarasonur føddur ella ein stórur hernaðarligur sigur.

Í kristindómsins fyrstu áratíggjum tóku tey kristnu orðið til sín sum heiti fyri tí gleðiliga boðskapinum, sum kristindómurin boðaði í missiónsarbeiðinum. Serliga í Paulusar brøvum er orðið kent í tí upprunaliga kristna týdninginum. Tá ið Paulus skrivar síni brøv um ár 50, eru enn ongar evangeliiskriftir, men Paulus brúkar orðið meira enn hálvt hundrað ferðir júst um ta munnligu boðanina. Tað sæst skilliga í m.a. teimum fyrstu ørindunum í Paulusar brøvum til meinigheitina í Róm.

Men hvussu kann tað tá bera til, at “evangelium” kemur at merkja ein skrivtlig frágreiðing um Jesu lív? Tað er hugsandi tann reglan, sum høvundurin til Markusevangeliið byrjar sína bók: “Upphavið til gleðiboðskapin um Jesus Krist, Guds Son.” Tað er av røttum at halda, at Markusevangeliið er fyrsta samlaða skrivaða frásøgn um Jesu lív, so tá ið høvundurin byrjar sína bók við hesari reglu, skilst tað tískil, at hann vil skriva um, hvussu tann fyrsta Kristusboðanin byrjaði, nevniliga við Jesu dópi og virksemi annars til hansara uppreisn. Men rættiliga skjótt verður reglan lisin sum heiti á allari bókini: Her byrjar tann skrivliga frágreiðingin um Jesus Kristus. Tað er hesin týdningur, sum skjótt vinnur fram og hevur hildið sær heilt upp til dagin í dag.

Í lutherskari teologi fær “evangelium” enn ein týdning. Tá tað er í hugtaksparinum “lóg og evangelium” verða tey bæði orðini nýtt í hvør sínari øvutari fatan av frelsuni, at teir góðu gerningarnir eftir lógarinnar vegleiðing ikki eru ein møguligur frelsuvegur, men at menniskjan einans kann verða frelst við at Gud í sínum kærleika tekur ímóti menniskjanum.

# OKTOBER

| | |
|---|---|
| Týsdagur 1. | **1. Jóh. 4,1-21** // Jesus Kristus er komin í hold |
| Mikudagur 2. | **5,1-12** // Guð hevur givið okkum ævigt lív |
| Hósdagur 3. | **5,13-21** // Hesin er hin sanni Guð og ævigt lív |
| Fríggjadagur 4. | **2. Jóh. 1,1-13** // Hetta er kærleikin, at vit gera eftir boði hansara |
| Leygardagur 5. | **Sl. 115,12-18** // Av Harranum eru tit signað |
| Sunnudagur 6. | 16. s. e. trinitatis // **Luk. 7,11-17** |
| Mánadagur 7. | **3. Jóh.** // Tann, ið ger gott, er av Guð |
| Týsdagur 8. | **Zak. 1,1-17** // Harrin skal aftur ugga Zion |
| Mikudagur 9. | **2,1-17** // Flýggið úr norðurlandinum |
| Hósdagur 10. | **3,1-10** // Sí, eg havi tikið misgerð tína av tær |
| Fríggjadagur 11. | **4,1-14** // Eg síggi ljósastaka, sum allur er av gulli |
| Leygardagur 12. | **Sl. 116,1-19** // Frelsunnar bikar eg hevja vil hátt |
| Sunnudagur 13. | 17. s. e. trinitatis // **Luk. 14,1-11** |
| Mánadagur 14. | **Zak. 5,1-11** // Eg síggi fljúgvandi bókrullu |
| Týsdagur 15. | **6,1-15** // Hann skal byggja tempul Harrans |
| Mikudagur 16. | **7,1-14** // Teir gjørdu oyru síni deyv |
| Hósdagur 17. | **8,1-8** // Sí, eg man bjarga fólki mínum heim |
| Fríggjadagur 18. | **8,9-17** // Tit skulu verða eitt signingarynski |
| Leygardagur 19. | **Sl. 117,1-2** // Harranum lovið, fólkasløg øll |
| Sunnudagur 20. | 18. s. e. trinitatis // **Matt. 22,34-46** |
| Mánadagur 21. | **Zak. 8,18-23** // Vær viljum fara við tykkum |
| Týsdagur 22. | **9,1-17** // Sí, kongur tín til tín kemur |
| Mikudagur 23. | **10,1-12** // Eg bríksli á teir og savni teir saman |
| Hósdagur 24. | **11,1-17** // Vei, hinum ónýta hirða |
| Fríggjadagur 25. | **12,1-14** // Á tí degi verður mikil harmgrátur |
| Leygardagur 26. | **Orðt. 25,1-13** // Erpa tær ikki inni fyri kongi |
| Sunnudagur 27. | 19. s. e. trinitatis // **Matt. 9,1-8** |
| Mánadagur 28. | **Zak. 13,1-9** // Eg man siga: «Hetta er fólk mítt.» |
| Týsdagur 29. | **14,1-11** // Oljufjallið skal klovna um tvørt |
| Mikudagur 30. | **14,12-21** // Og allir teir fara niðan at halda leyvskálahátíðina |
| Hósdagur 31. | **Ják. 1,1-18** // Roynslan av trúgv tykkara virkar tolmóð |

# NOVEMBER

| | |
|---|---|
| Fríggjadagur 1. | **Ják. 1,19-2,7** // Hvør menniskja veri snar til at hoyra |
| Leygardagur 2. | **Sl. 118,1-14** // Miskunn hans varir um ævir |
| Sunnudagur 3. | Allahalgannardagur // **Matt. 5,1-12** |
| Mánadagur 4. | **Ják. 2,8-26** // Um tit gera mannamun, tá gera tit synd |
| Týsdagur 5. | **3,1-12** // Tunguna kann eingin menniskja temja |
| Mikudagur 6. | **3,13-4,10** // Rættferðar frukt verður sáað í friði |
| Hósdagur 7. | **4,11-5,6** // Hvør ert tú, sum dømir næstan? |
| Fríggjadagur 8. | **5,7-20** // Verið tí tolnir, brøður, til Harrin kemur |
| Leygardagur 9. | **Sl. 118,15-29** // Hetta er dagurin, ið Harrin hevur gjørt |
| Sunnudagur 10. | 21. s. e. trinitatis // **Jóh. 4,46-53** |
| Mánadagur 11. | **Est. 1,1-20** // Vasjti drotning vildi ikki koma eftir kongsins boði |
| Týsdagur 12. | **1,21-2,7** // Gentan var vælvaksin og fríð í ásjón |
| Mikudagur 13. | **2,8-23** // Ester fann náði í eygum alra teirra, ið hana sóu |
| Hósdagur 14. | **3,1-11** // Mordokai vildi hvørki falla á knæ ella lútaði honum |
| Fríggjadagur 15. | **3,12-4,3** // Á borgina Súsan var ræðsla lopin |
| Leygardagur 16. | **Sl. 119,1-16** // Eg orð tíni goymi í mínum hjarta |
| Sunndagur 17. | 22 s. e. trinitatis // **Matt. 18,23-35** |
| Mánadagur 18. | **Est. 4,4-17** // Eigi eg at farast, tá lat meg farast! |
| Týsdagur 19. | **5,1-14** // Hon vann yndi hans |
| Mikudagur 20. | **6,1-14** // Háman skundaði sær heim dapur í huga |
| Hósdagur 21. | **7,1-10** // Eg og tjóð mín eru seld til at verða týnd |
| Fríggjadagur 22. | **8,1-14** // Skrivið nú tit viðvíkjandi Júdeum |
| Leygardagur 23. | **Sl. 119,17-32** // Trúskapar gøtu havi eg valt |
| Sunnudagur 24. | Síðsti sunnudagur í kirkjuárinum // **Matt. 22,15-22** |
| Mánadagur 25. | **Est. 8,15-9,19** // Hjá Júdeunum var ljómi og gleði, fagnaður og heiður |
| Týsdagur 26. | **9,20-10,3** // Hesir dagar skuldu minnast og verða hildnir |
| Mikudagur 27. | **Jud. 1-16** // Teir hava gingið á Káins vegi |
| Hósdagur 28. | **17-25** // Haldið tykkum sjálv í Guðs kærleika |
| Fríggjadagur 29. | **Filem. 1-25** // Eg biði teg fyri barn mítt, Onesimus |
| Leygardagur 30. | **Orðt. 25,14-28** // Mjúk tunga brýtur sundur bein |



# NÝGGJ BÍBLIUUMSETING ÁVEGIS!

Meðan Hans Jacob Joensen var bispur, byrjaði hann at umseta Bíbliuna úr grundmálunum. Mál hansara var at gera eina økumeniska umseting, sum øll kristin í Føroyum kundu semjast um at brúka.

Hetta er sera umfatandi arbeiði, sum betur stundir vóru at røkja, eftir at hann fór frá í 2007. Nýggja Testamenti, sum hann umsetti saman við Kjartan Mørkøre, Jens Vilhelm Danielsen og Dánial á Dul Jacobsen, varð handa Føroyska Bíbliufelagnum 26. mai 2014. Á várið í 2017 var  Gamla Testamenti handa og sostætt var komið á mál við hesi megnar verkætlan.

Síðani tá, hevur Fróðskaparsetrið havt Nýggja Testamenti til gjøgnumlestur, meðan onnur hava hugt at Gamla Testamenti. Nú er so um at vera klárt at senda út til onnur at hyggja ígjøgnum og koma við viðmerkingum.

Hesin parturin og sjálv útgávan, krevur nógva orku – eisini fíggjarliga. Tí vilja vit heita á tykkum lesarar, um andaligan og fíggjarligan stuðul til fyrstu føroysku umsetingini av allari Bíbliuni í góða hálva øld.

**Ynskja tygum at stuðla bíbliuarbeiðinum við peningagávu, kann hetta gerast við at flyta pening á niðanfyri standandi konto:**

BankNordik 6460-382.873.7
Betri Banki 9181-380.777.2
Norðoya Sparikassi 9865- 992.646.6
Suðuroyar Sparikassi 9870-992.061.8
Minst til at viðmerkja: Gáva.

Føroyska Bíbliufelagið

# Føroyska Bíbliufelagið

Fyri at gerast limur í Føroyska Bíbliufelagnum er neyðugt at árliga limagjaldið á 200,- kr. er goldið frammanundan.

Føst flyting tryggjar, at limaskapurin verður varðveittur. Henda áheitan til peningastovn kann nýtast at stovna eina fasta flyting til Bíbliufelagið.

Til ber eisini sjálv/ur at stovna fasta flyting um netbanka og at maila navn og fartelefon til biblia@biblia.fo

Navn: ________________________________

T-postur: ______________________________

Fartel.: ________________________________

Heitt verður á: (set x við tín peningastovn) um at stovna
fasta árliga flyting til:

☐ BankNordik konta nr. 6460 382 873 7

☐ Eik Banka konta nr. 9181 380 777 2

☐ Norðoya Sparikassa konta nr. 9865 992 646 6

☐ Suðuroyar Sparikassa konta nr. 9870 992 061 8

av kontu míni: ___________________________

Dagur og undirskrift: ______________________

Giljavegur 32 · FO-360 Sandavágur
T-postur: biblia@biblia.fo · www.biblia.fo

# Stýrislimirnir í føroyska bíbliufelagnum

**Jógvan Fríðriksson**, forseti í stýrinum, biskupur, fólkakirkjan Bergur
**D. Joensen**, formaður í stýrinum, sóknarprestur, fólkakirkjan
**Dánial á Dul Jacobsen**, næstformaður í stýrinum, hvítusunnusamkomurnar
**Uni Næs**, stýrislimur, dómpróstur, fólkakirkjan
**Pauli Høj**, stýrislimur, pastorur í Kelduni, karismatisku kirkjurnar
**Ole Jakob Nielsen**, stýrislimur, listamaður, Katólska kirkjan
**Jenny Lydersen**, stýrislimur, undirvísingarleiðari á Menta mála-ráðnum, fólkakirkjan
**Øssur Kjølbro**, stýrislimur, aðalskrivari, Kirkjuliga Heimamissiónin
**Atli Rasmussen**, stýrislimur, Kirkjuliga Missiónsfelagið, HR-leiðari á Lív
**Tummas Lauritsen**, stýrislimur (valdur á aðalfundi 2018), faklærari í Tekniska skúla
**Hallgerð Akursstein,** stýrisslimur (vald á aðalfundi 2018) samkomuleiðari í Soli deo Gloria
**Gunnar K. Nattestad**, aðalskrivari hjá Bíbliufelagnum

# Endamál

**Endamálið hjá Føroyska Bíbliufelagnum er:**

1. at geva út Bíbliuna og partar av henni á føroyskum máli og at fáa Bíbliuna út
2. at skipa fyri at týða Bíbliuna ella partar av henni, at endurskoða verandi bíbliuútgávur, at geva út bíbilsku skriftirnar í øðrum útgáv um enn teimum løggildu og annað viðkomandi tilfar
3. at fremja bíbliunýtslu, bíbliulesnað og bíbliukunnleika
4. at hava innsavningar og forlagsvirksemi
5. at umsita sambandið við útlendsk bíbliufeløg
6. at stuðla altjóða bíbliuarbeiði

# STYTTINGAR

| | |
|---|---|
| Ám | Ámos |
| Áps | Ápostlasøgan |
| Dán | Dánjal |
| Dóm | Dómarabókin |
| Ef | Efesusbrævið |
| Est | Esterarbók |
| Ez | Ezekiel |
| Ezra | Ezra |
| Fil | Filippibrævið |
| Filem | Filemonsbrævið |
| Gal | Galatarbrævið |
| Hab | Habakkuk |
| Hagg | Haggai |
| Harm | Harmljóðin |
| Hás | Hásongurin |
| Hebr | Hebrearabrævið |
| Hos | Hosea |
| Ják | Jákupsbrævið |
| Jer | Jeremia |
| Jes | Jesaja |
| Job | Jobsbók |
| Jóel | Jóel |
| Jóh | Evangeliið eftir Jóhannes |
| Jón | Jónas |
| 1 Jóh | Fyrsta bræv Jóhannesar |
| 2 Jóh | Annað bræv Jóhannesar |
| 3 Jóh | Triðja bræv Jóhannesar |
| Jós | Jósva |
| Jud | Judasarbrævið |
| Kol | Kolossubrævið |
| 1 Kong | Fyrra Kongabók |
| 2 Kong | Seinna Kongabók |
| 1 Kor | Fyrra Korintbrævið |
| 2 Kor | Seinna Korintbrævið |
| 1 Krýn | Fyrra Krýnikubók |
| 2 Krýn | Seinna Krýnikubók |
| Luk | Evangeliið eftir Lukas |
| Mal | Malaki |
| Mark | Evangeliið eftir Markus |
| Matt | Evangeliið eftir Matteus |
| Mika | Mika |
| 1 Mós | Fyrsta Mósebók |
| 2 Mós | Onnur Mósebók |
| 3 Mós | Triðja Mósebók |
| 4 Mós | Fjórða Mósebók |
| 5 Mós | Fimta Mósebók |
| Nah | Nahum |
| Óbad | Óbadia |
| Opb | Opinberingin |
| Orðt | Orðatøk Sálomons |
| 1 Pæt | Fyrra Pætursbræv |
| 2 Pæt | Seinna Pætursbræv |
| Præd | Prædikarin |
| Róm | Rómverjabrævið |
| Rut | Rutarbók |
| 1 Sám | Fyrra Sámuelsbók |
| 2 Sám | Seinna Sámuelsbók |
| Sef | Sefanja |
| Sl | Sálmarnir |
| 1 Tess | Fyrra Tessalónikubræv |
| 2 Tess | Seinna Tessalónikubræv |
| 1 Tim | Fyrra Timoteusarbræv |
| 2 Tim | Seinna Timoteusarbræv |
| Titus | Titusarbræv |
| Zak | Zakarja |

# ESKJA TIL BÍBLIUVERS




Eitt bíbliuvers gevur høvi til umhugsan og kann eggja til bíbliulesna. Bíbliufelagið hevur latið gjørt eskjur til bíbliuvers. Eskjan hevur ein vakran reyðan lit og kann standa ella hanga í forkirkjuni og í missións- og samkomuhúsum o.a.
Á eskjuni er teksturin: „Fá tær eitt bíbliuvers."
Í hvørjum bunti av bíbliuversum eru umleið 250 kort við ymiskum bíbliuversum.
Eskja og bíbliuvers fáast til keyps frá Bíbliufelagnum.




Bíbliu-Appin er til iPhone, iPad, iPod touch og Android. Les meira á www.biblia.fo

Bíbliufelagið hevur latið gjørt Bíbliu-App til Dahl/Viderø Bíbliuna. Við appini kanst tú lesa alla Bíbliuna á fartelefonini/teldlinum, leita í Bíbliuni, fáa mannakorn til hvønn dag, deila á facebook og mangt annað.

**Vitja heimasíðuna hjá Bíbliufelagnum**
**Á heimasíðuni ber til at lesa og**
**hoyra upplestur (teldutala) av Bíbliuni og greinum.**

**Les meira á: www.biblia.fo**
**Føroyska Bíbliufelagið**
**Giljavegur 32**
**FO-360 Sandavágur**
**T-postur: biblia@biblia.fo**